


Intrum í Íslandi er partur av altjóða innheintingarfyritøkuni Intrum Justitia, sum er fremsta fyritøka í Evropa innan miðvísa áognarstýring (Credit Management Services). Á hvørjum ári viðger Intrum milliónir av málum fyri fyritøkur og stovnar kring allan heim. Um 3000 fólk starvast hjá Intrum í 22 londum í Evropa, og harafturat hevur fyritøkan fleiri enn 120 umboðsskrivstovur víða um heimin. Hjá Intrum í Íslandi starvast fleiri enn 100 fólk á átta skrivstovum kring landið. Intrum býður fyritøkum og stovnum heildarloysnir á innheintingarøkinum, sum m.a. fevnir um Innkrevjing (INKASSO), Eftirlit við áogn, Millumlandainnkrevjing, Rættarinnkrevjing, Skuldaraupplýsingar, MVG-endurgjald og Ráðgeving. Kunningartøkni er stórur partur av virkseminum hjá Intrum. Kunningartøkni og miðvís menning av starvsfólkaliðnum hava mestan týdning fyri tann serstaka innheintingarhátt, sum Intrum hevur lagt seg eftir at nýta. Dømi um hetta er, at Intrum býður viðskiftafólki sínum atgongd til umfatandi heimasíðu, har tey betur kunnu fylgja við, hvat innheintingini líður.

# Ert tú eitt gott starvsfólk?

Um nakrar vikur fer Intrum í Íslandi í samstarvi við føroyskar íleggjarar at lata upp Intrum Justitia skrivstovu í Tórshavn. Vit leita eftir røskum og ágrýtnum starvsfólkum til at verða við í hesi áhugaverdu verkætlan.
Vit vilja hava, at starvsfólk okkara duga føroyskt og enskt til lítar í talu og skrift, og fyrimunur er at duga eitt sindur av íslendskum eisini.

**Tey størv, sum vit leita eftir fólki til, eru:**

- **Stjóri**
  Stjórin stendur fyri dagligu leiðsluni av fyritøkuni. Stjórin skal byggja upp fyritøkuna, m.a. eina sterka marknaðar- og søludeild. Stjórin hevur eftirlit við fíggjarviðurskiftum og starvsfólkaøkinum. Hann/Hon hevur ábyrgd av at áseta stevnumið, arbeiðssetningar og leggja ætlanir.
  Stjórin má hava vinnulívsútbúgving og royndir innan leiðslu og sølu.

- **Sølu- og ráðgevastørv**
  Starvið fevnir um sølu og marknaðarføring av teimum tænastum, sum Intrum veitir, samskifti við viðskiftafólk, greining og ráðgeving um hvussu fram skal farast í sambandi við áogn, og harumframt at geva tilboð og gera sáttmálar. Tann, ið settur verður, eigur helst at hava vinnulívsútbúgving ella hollar royndir av sambærligum starvi.

- **Gjaldaratænasta**
  Starvið fevnir m.a. um vanligt telduarbeiði og avgreiðslu. Starvsfólkið skal geva gjaldarum upplýsingar, ringja til gjaldara og hava samskifti við starvsfólk á innheintingardeildini hjá fyritøkum, sum nýta tænasturnar hjá Intrum. Hollar royndir frá skrivstovu- ella bankastarvi eru fyrimunur men ikki treyt.

- **Tænastur til fyritøkur**
  Starvsuppgávurnar eru m.a. at veita upplýsingar, hava samskifti við viðskiftafólk í sambandi við innheinting og at taka við krøvum. Upplýsingar verða savnaðar og frágreiðingar skrivaðar. Vinnulívsútbúgving og hollar royndir innan skrivstovuyrkið eru fyrimunur men ikki treyt.

Leitað verður eftir einstaklingum, sum eru sjálvstøðugir, hava evni at samskifta, hava áræði og eru áhaldandi. Viðkomandi skulu hava leiðaraevni og duga at arbeiða í bólki, vera lagaligir og harafturat brenna fyri at røkka úrslitum í krevjandi starvi.

Nærri upplýsingar veitir Benjamín Axel Árnason, verkætlanarleiðari hjá Intrum í Íslandi. Nú er bara at gera skjótt av og senda umsókn til **benjamin@intrum.is.** Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

# Göran Sonnevi fær Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins

Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins verður í ár handað svianum Göran Sonnevi fyri yrkingasavnið 'Oceanen'. Saman við heiðrinum fær Sonnevi 350.000 danskar krónur, tá Norðurlandaráðið kemur saman í heys

**BÓKMENTIR**

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Grundgevingin hjá dómsnevndini er hendan:
"Oceanen er eitt hav av orðum, ein kann lata seg falla í lata seg verða sveipaðan av. Hon fevnir um eitt lív og eina poesi, sum enn er livandi, sum ikki er liðug, og sum enn er leitandi. Við inniligari neyðsyn skrivar Sonnevi skaldskap, sum er í samrøðu við politisk og sosial fyribrigdi eins og persónligar spurningar um skyld og ábyrgd".

Bókmentavirðislønin er latin síðani 1962. Í 1965 fekk William Heinesen virðislønina fyri skaldsøguna "Det gode håb" saman við svianum Olof Lagercrantz, og í 1986 fekk Rói Patursson hana fyri yrkingasavnið "Líkasum".

Eingin føroyingur var innstillaður í ár.



*Göran Sonnevi*

## Hesi vóru innstillað í ár:

**Danmark**
Claus Beck-Nielsen – *Selvmordsaktionen. Beretningen om forsøget på at indføre Demokratiet i Irak i året 2004,* Skaldsøga/prosa

Thomas Boberg – *Livsstil,* yrkingar

**Finnland**
Asko Sahlberg – *Tammilehto* (Eklunden), skaldsøga
Fredrik Lång – *Mitt liv som Pythagoras,* skaldsøga

**Ísland**
Auður Jónsdóttir – *Fólkið í kjallaranum* (Dem i kælderen), skaldsøga
Kristín Marja Baldursdóttir – *Karitas, án titils* (Karitas, utan titel), skaldsøga

**Noreg**
Edvard Hoem – *Mors og fars historie,* skaldsøga
Øivind Hånes – *Pirolene i Benidorm,* skaldsøga

**Svøríki**
Lotta Lotass – *skymning:* gryning, skaldsøga
Göran Sonnevi – *Oceanen,* yrkingasavn

**Grønland**
Julie Edel Hardenberg – *Den stille mangfoldighed,* myndapoesi

**Sámiska máløkið**
Jovnna Ande Vest – *Arbbolaccat 3* (Arvingene 3), skaldskapur